## DAGSINS MEINING

# Ræðandi ræðukapanja!

Ikki bara Sambandsflokkurin leggur fram ræðusøgur um, hvussu óskilið verður, um Føroyar fáa fullveldi. Á hinum bógnum er Tjóðveldisflokkurin líka ringur. Á stórari lýsing spyr og hóttir flokkurin, um »fólk vilja heimastýrast« og »landskassin tømast«!!!

Kunnu vit taka flokkar, sum leggja fram valagitatión á slíkum støði, í fullum álvara? Kunnu vit seta spjaldrið ábyrgdarflokkur á slíka villeiðandi agitatión? Neyvan!

Eingin vil »heimastýrast«, og eingin politiskur flokkurin, sum er at sær komin fíggjarliga, fer at »tøma landskassan«!

Tað eru nú nógv ár síðani, at landsfundur Javnaðarfloksins ásannaði, at heimastýrislógin var ikki nøktandi og tíðarhóskandi. Í summum førum vóru vit farin út um karmin í heimastýrislógini. Í øðrum førum var ábyrgdarbýtið ikki greitt. Og í øðrum førum eru komin málsøki, sum ikki vóru kend, tá heimastýrislógin varð gjørd.

Sami landsfundur setti niður eina nevnd at endurskoða støðuna millum Føroyar og Danmark, og nøkur ár seinri samtykti landsfundur floksins, at virkast skuldi fyri eini sjálvstýrislóg.

Tí kann Javnaðarflokkurin ikki skuldsetast fyri at vilja »heimastýrast«. Javnaðarflokkurin vil hava nýggjan sáttmála, sum skal heimila okkum at taka yvir øll málsøki. Londini skulu vera javnsett og føroyingar skulu hava fullan avgerðarrætt. Flokkurin vil hava greitt ábyrgdarbýti millum donsk og føroysk viðurskifti.

Hinvegin er tað nú politikkur Tjóðveldisfloksins, at vit skulu ikki hava nýggjan sáttmála við danir, men at vit skulu yvirtaka sambært tí 54 ára gomlu heimastyrislógini!!! Vil hann heimastýrast? Neyvan í longdini, men í øllum førum fram til 2012!

Allir føroyingar fegnast um, at tað sæst ikki niður á kistubotn, og at vit hava hálvatriðju milliard krónur í Landsbankanum. Hinvegin fegnast vit ikki um støðuna hjá pensjónistum, brekaðum og teimum, sum ikki hava tak yvir høvdið. Heldur ikki fegnast vit um teir sosialu skeivleikar, sum tann góða tíðin hevur borið við sær. M.a. við so høgum íbúða- og sethúsaprísum, at føroyingurin við vanligari inntøku ikki hevur ráð at seta føtur undir egið borð.

Tí er neyðugt við átøkum, íløgum og útreiðslum. Men sum ein ábyrgdarflokkur fer Javnaðarflokkurin ongatíð at brúka meiri pening, enn vit forvinna. Sum ein fiskivinnutjóð – við lækkandi og hækkandi veiði og prísum – skulu vit hava pening at standa ímóti við, og tí fer Javnaðarflokkurin ikki at tøma nakran landskassa. Men Javnaðarflokkurin fer ikki at spara saman til eitt fullveldi og góðtaka sosiala neyð og armóð, sum Tjóðveldisflokkurin hevur gjørt.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hví skal Fiskavirking privatiserast?

**Frank Davidsen**



Og tað av Fólkaflokkinum, sum sleit samgonguna við Javnaðarflokkin, júst orsaka av Fiskavirking.

Meðan Javnaðarflokkurin fyrst og fremst royndi at fáa gongd á aftur fiskavirkini runt landið, royndi Fólkaflokkurin av øllum alvi at sabotera hesa ætlan. Meðan tað sokallaða »fría initiativi« spældi fallit, gjørdist Fiskavirking við eini sera dugnaligari leiðslu tað alternativ, ið hevði við sær, at út móti 1.000 arbeiðspláss, seinastu árini hava givið samfelagnum eins og verkamannafjøldini eitt veldugt íkast.

Javnaðarflokkuin tekur bert undir við privatiseringum, um tað gagnar tí almenna, og tekur als ikki undir við privatiseringum í óðum verkum, so sum teir borgarligu flokkarnir standa fyri.

Hjá teimum sokallaðu liberalistunum ræður um at fáa fatur á Fiskavirking, Føroya Banka, Føroya Tele, Atlantic Airways o.ø. ongantíð ov skjótt. Tess minni fær skattgjaldarin aftur av tí peningi, hann misti undir kreppuni.

Javnaðarflokkurin er einasti flokkur, ið ikki fer at avreiða ognir landsins fyri ein løtuvinning.

# Ein mynd

Úr »trælkan og kúgan« vit loysi, – vitloysi.
»Sjálvberandi« úti og heima vit ør fiska, – ørfiska.
Við »frælsi« úr hafti gerast vit leys, – vitleys.
Í geislandi roða til skýggja vit borin,– vitborin.

Til hildarting menn fróðir hava eggjað,
í Koltri og í Dímunar Grønu Skor at breggja,
øll »dana olmussa« av eggini og á bláman tveggja.

Feðgarnir báðir í koti á brøttum feitilendi,
nýtelgdum, vælsnikkaðum lógum í hendi:
»Alt óføroyskt á bálið, í eldin vit festa,
nú má bera ella bresta.«

Mikil rómi tá gjørdist á Gróthústanga.
»Av landinum øll, í donskum veli hanga,
skál brøður, vit land og lagnu í egnar hendur leggja,
tømið steypið, ljóðið Frælsiskvæðið, vit mentað breggja.«

Skonkt og kvøðin varð hann Ormurin Langi.
Brókatøk, glímdust menn fast og leingi,
– stygdi fólk og fæ og fuglameingi –
varnaðust ei, til tøð har var ein tangi!

Gleimur úti og inni,
vitið lítið skilið minni.
Við Óla trupult var at flætta:
hvør torur tong við mær at rætta?

Bragdligar røddir brádliga tagna,
longutong krøkt líðandi man dragna.
Í køstin eftir nakkanum og Óli misti minnið,
sum Jákup á Møn í sínum køsti á sinni.

Dagur í roða rodnandi varliga raknar,
smá kykt og fólk og fæ úr svøvni vaknar.

Sorlað og morlað alt sópað í fonnum.
Gána og stara við eygum tómum:
Fer føroyingurin aftur at ana av tara og hvonnum?

Tari ella hvonnur sama ger,
eftir hæli fer ongin Hesaferð:
Nú skal røkka ella støkka.
Frælsið – ella søkka.
Okkum frelsi,
góði El Che.

Til sjóvarstrond á børu Óli varð nú borin,
eri eg av longutong so meint og illa sorin?
Snekkjur prúðar við knarrarborð har lógu.
Løgdu allar árar út, til Havnar øll tá róðu.

Veri flogið høgt og røddin snjøll,
sakar tá ongan fávitskutrøll.
Lystiliga dansa og kvøða øll
leikandi lætt yvir grønan vøll.

Fragdarljóð kvøll.

humohristur

***Heri Mohr***

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VALGREINAR

# Skal høvdið niður aftur í sandin?

**Karsten Hansen**
*Valevni hjá Tjóðveldisflokkinum*



Gjøgnum 80-árini gekk fjøldin av lands- og kommunupolitikkarum á odda og lótust, sum um fíggjarlóg og fíggjarætlan bert høvdu eina útreiðslusíðu. Sum fráleið fekk nattúrligt nokk stórur partur av fólkinum eisinin somu fatan. Og fleiri høvd fóru niður í sandin.

Hann, ið ikki var vaknaður áður, hann varð skræddur úr svøvni 6. oktober 1992. Nú var ongin sandur fyri eygunum meira. Fólkið alt – eisini politikkararnir – sóu, at samfelagið alt var farið á húsagang.

Avleiðingarnar og sviðan kenna vit flest øll. Hópur av fólki rýmdi undan neyðini. Vinnulívið fór av knóranum. Og risa uttanlandsskuldin endaði øll í landskassanum. Palleba fekk rokningina við stórum eykaskatti, sum gjaldast skuldi, umframt tey stóru lán, hann hevði í egnum húsum.

Tá eg í 1998 fekk ábyrgd av fíggjarmálum, setti eg mær fyri at halda tað, sum stendur í samgonguskjalinum, nevniliga: at rikin verður ein varin og ábyrgdarfullur búskaparpolitikkur.

Eg tori at siga, at eg bókstaviliga havi barst fyri hesi søk. Og hví tað? Jú fyri at gera tað, sum stóð í mínari makt fyri, at føroyingar ikki skulu uppliva ein 6. okt., sum í 1992, aftur.

Hesi 4 árini hevur framburðurin verið størri enn nakrantíð. Nógvur fiskur, góður prísur, alivinnan í stórum vøkstri og eitt væl rikið vinnulív. Fyri at tálma búskapinum er loft lagt á íløgurnar hjá landinum og kommununum. Gjørd er langtíðarætlan um, hvussu samfelagið skal útbyggjast. Og samstundis er samfelagið útbygt sum ongantíð áður.

Hetta skeiðið hevur avlopið á fíggjarlógini verið í meðal 600 milliónir krónur um árið. Hetta er helst líka nógv sum seinastu undanfarnu 30 árini.

Men áðrenn kreppuna gekk alt jú fínt. Til tíðir nógvur fiskur og góður prísur og hópurin av alibrúkum. Hví gekk tað so galið?

Stutt sagt: Man brúkti í nógv fylgjandi ár nógv meira, enn forvunnið var, og landið veðhelt fyri milliardir.

Og tað vóru at kallað ongi stýringsamboð. Landsroknskapurin var fleiri ár afturút. Fyri 1995, 96 og 97 vóru roknskapir ikki lidnir. Og roknskapirnir fyri 1992, 93 og 94 vóru ikki avgreiddir frá Løgtinginum.

Nú er roknskapurin ikki bara dagførdur, Hann verður eisini lagdur fram áðrenn tíðina. Gjørdur verður nú eisini mánaðarroknskapur, sum liggur á alnetinum.

Roknskaparreglugerð, nýggj roknskaparskipan, útgjaldsskipan, nýggj lønarskipan, leiðslukunningarskipan, budgettskipan (ísv. gerð av fíggjarlóg) og skrásetingarskipan av landsins ognum er í gerð.

Gjørt er nýtt prístal (tað gamla hevði verið ónýtiligt í mong ár). Og tjóðarroknskapur er gjørdur; tann fyrsti veruligi síðani 1982.

Álit er gjørt um landsgrunnar og landsstovnar um tilknýti til fíggjarlóg og landsroknskap. Boð eru givin til aðalstýrini um at fáa hetta í rættlag. Og játtanarskipanin er tryggja munandi og verður í løtuni endurskoðað.

Samanumtikið kann sigast, at tað var ikki løgið, at tað gekk heilt galið við landsins búskapi. Tað var snøkt sagt ikki møguligt at fáa eina neyva vitan um støðuna í samfelagnum. Tær nú broyttu umstøðurnar gera, at heldur tú høvdið uppi úr sandinum, ja, so hevur tú neyðugu vitanina at stýra samfelagnum.

Andstøðan hevur greitt boðað frá, at nú skal brúkast av uppspardu krónunum!

Góði veljari. Avgerðin er tín. Skal høvdið niður aftur í sandin, so er valið einfalt. Ynskir tú hinvegin eina trygga framtíð við varnum búskaparpolitikki, so er valið sjálvsagt: Ein sterkan Tjóðveldisflokk á ting.

Vel fólk á ting, sum eisini hava dirvið at siga nei, tá á stendur.

# Loysingarrokningin oyðileggur Føroyar

**Marjus Dam**
*valevni Sambandsfloksins í Vágum*



Rokningin fyri loysing: 9375 kr um mánaðin pr. lønmóttakara.

1,8 mia/16.000 = 112.500,00 kr/ár ella 9.375 kr um mánaðin fyri hvønn einast lønmóttakara.

Ungur sum eldri. Hava tygum nakrantíð fingið svar uppá, hvat rokningin er fyri loysingina?

Nei.

Hví man so vera? Eru ikki Hvítabøkur skrivaðar, ið skuldu vísa alt? Hví nevna teir allir, Høgni Hoydal, Annfin Kallsberg, so onki orð um rokningina? Tvørturímóti tosa teir um at nýta pening, sum ongantíð áður, og latast sum teirra loysingarætlan ongar fíggjarligar avleiðingar hevur fyri land og fólk.

Í samtyktini 20. apríl 2001, ið Fólkaflokkurin, Tjóðveldi og Sjálvstýri gjørdu um »Sjálvstýri Føroya Fólks« stendur, »at gera neyva meting av kostnaðinum, ið stendst av uppskotinum, er rættiliga trupult«. Tað er tað als ikki. Tvørturímóti er tað lætt. Og úrslitið stendur ovast. Men úrslitið er ikki tespiligt fyri føroyingar. Tí tiga teir við úrslitinum!

Føroyar eru í dag í Ríkisfelagsskapinum, og dag og dagliga hoyra vit loysingarfólk rósa skipanini, við tað at sagt verður, at tað gongur so væl í Føroyum - Heimastýris-Føroyum. Hví so avtaka eina skipan, ið er góð?

Serliga undir valkampinum er púrt onki samsvar ímillum loysingina og vallyftini. Tí loysingin merkir ikki útbygging – men tvørturímóti dygga skerjing innan øll økir í samfelagnum.

### Mogens Lykketoft:

Ríkisveitingin er ár 2000 1322 milliónir krónur (Rigsombudsmanden, beretning 2000 s.144 tabel 6.1). Afturat hesum kemur stuðul til lesandi í Danmark og aðrar staðir, og sambart notati frá finansministaranum Mogens Lykketoft er talan tilsamans um ca 1,8 milliard krónur um árið.

Hetta er tann samlaða upphæddin ímillum Føroyar og Danmark. Um loyst verður skal hendan upphædd burtur. Í Føroyum eru helst umleið 16.000 heiltíðarstørv. Loysingarrokningin er tí sera løtt at rokna út. 1,8 mia deilt við 16000 lønmóttakarum. Úrslitið stendur ovast og tað er skelkandi, at politiski myndugleikin roynir at fjala rokningina fyri føroyingum. Um slíkur framferðarháttur fer fram hjá t.d. einum sølumanni, so hevði hann enda í bolt og jarni innan stutta tíð. Men tað tykist, sum um samgongan kann lumpa føroyingar – uttan ankrar avleiðingar. Endar nakað galið – so skulu politikkarar kanna sínar arbeiðsfelagar. Ein bók verður givin út. Og ongar avleiðingar eru fyri teir, ið leiða fólki – føroyingar – í óføri. Tað má halda uppat.

Hvat við realpolitikki

### Hvat við eitt sindur av Sambandspolitikki

Hví ikki viðganga, at Ríkisfelagsskaps politikkur kann byggja samfelagið út – ímeðan loysingarpolitikkur merkir skerjing. Tað er jú ein erlig sak. Men tað er ikki rætt, at lata sum um ongin munur er – serliga ikki fyri lønmótakaranum, ið fær 9.375 kr meira at gjalda um mánaðin.

X fyri lista B er X fyri trygd, vælferð og broytingum innan Ríkisfelagsskapin.

# Tann stóri gloymdi bólkurin

**Absalon Absalonsen**
*valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy*



Skulu tey fáa fulla upphædd, noyðast tey at skiljast.

Nógv er talað og skrivað um pensiónir í hesum valstríðnum, men ein stórur bólkur tykist vera fullkomiliga gloymdur. Tað snýr seg um fólk, sum tá tey náa 67 ár, eru gift við persóni, ið hevur inntøku, lat okkum hugsa okkum ein, ið er 10 ár eldri enn hjúnaðarfelagin, hann fær ikki fullan ágóða av síni fólkapensión fyrr enn hann er 77, til ta tíð má hann eftir galdandi reglum lata sær lynda við grundupphæddina tað merkir 3200 kr um mánaðin, restina legst samfelagið á.

Latið okkum minnast til, at tey flestu av teimum, sum í dag fylla 67, fóru til arbeiðis tá tey vóru 14.

Hetta er stórur órættur móti fólkum, sum hava verið skattgjaldarar í samfull 53 ár.( ein akademikari er skattgjaldari í 30 – 35 ár) Einasti møguleiki hesi fólk hava, skulu tey hava fullan ágóða av síni pensión, er at skiljast. Hetta eru sera mannminkand og ósømulig kor, samfelagið bjóðar hesum fólkum, sum ongan lut fingu í teim alment fíggjaðu útbúgvingarmøguleikum sum fingnir vóru til vega, tá tey vóru farin um ungdómsárini, tey fingu heldur einki av teim túsundtals almennu størvum, íð sett vóru á stovn í Føroyum í teirra tíð, men tey hava arbeitt við hondunum fyri alt hetta, sum onnur hava notið gott av.Eingin annar samfelagsbólkur skal upplýsa inntøkuna hjá sínum hjúnaðarfelaga tá pensiónir falla til gjaldingar.

### Kvinnur í føroyskum politikki.

Ein maður helt fyri við meg einaferð, at kemur ein vitug vøkur og dugnalig kvinna uppí føroyskan politik, og henni eyðnast at náa nøkur úrslit, so vera tað nakrir mannligir politikkarar, sum ikki tola tað, líta vit afturá, má ásannastat hesin maður hevði rætt. Móti kvinnuni, sum umsat almanna og heilsumál stóran part av farna vælskeiði, vóru lagdir allir hugsandi fótonglar ikki minst innanhýsis í sjálvstýrisflokkinum, haðani hon til seinast varð trýst burtur. Henni eyðnaðist at fremja munandi batar fyri fólkapensiónistarnar, men málinum sum henda grein byrjar fekk hon ikki undirtøku fyri.

Staðfestast kann eisini, at fólk, sum hevur víst í verki hvørjum hon stendur fyri, slapp ikki á listan hjá Javnaðarflokkinum. (Annars kemur ikki mær við hvønn Javnaðarflokkurin setur á listan.)

Eingin uttan Miðflokkurin hevur tikið áðurnevnda mál uppá tunguna undir valstríðnum. Málið hevur sostatt ongan góðan í nøkrum av hinum flokkunum

### Tað eru ikki pengar, men politiskur vilji íð manglar.

Tann ið sær tað, sum hendir í samfelagnum, undirsjóartunlar ferjur øktar tingmannalønir, yvirskot á fíggjarlógini o.s.fr., gerst skjótt greiður yvir at pengatørvur er ikki ársøkin til at omanfyri nevnda mál ikki er loyst, tað sum tørvur er á er politiskur vilji, og henda vilja hevur miðflokkurin.

Tá ein samstundis veit at ávísir politikkarar kunnu fáa, eina eftirløn úr landsstýrinum, eina aðra frá fólkatinginum, eina triðju frá løgtinginum, og ta fjóru frá einum borgarligum starvi, hetta verður túsundtals krónur um dagin har í ongum føri verður spurt eftir, um hjúnarfelagin hevur inntøku ella ikki. Ein sum í 53 ár hevur goldið skatt og bert kann fáa 100 kr. um dagin, hann kann saktans siga :

Væl er javna

### Vit taka málið í egnar hendur.

Tey ið bara hava fólkapensión at líta á og vera við skerdan lut vegna inntøkuna hjá hjúnaðar felagnum,eru so mikið mong í tali, at standa vit væl saman, ávirka vit valúrslitið sum einki. Tað er bara Miðflokkurin, sum hevur nevnt málið undir valstríðnum. Við at velja Miðflokkin taka vit málið í egnar hendur og loysa tað latið okkum gera tað 30. apríl.

Gott val og Gud signi Føroyar.